DAGSINS MEINING

Siðsemi og dupultmoralur

Eitt mál sum hetta við siðsemisnevndini er egnað at fáa alt upp á gos. Tað er als eingin ivi um, at trivnaðarráðharrin er lopin framav. Tað er eingin ivi um, at hann hevur valt nevndarlimir eftir teirra áskoðan fram um teirra fakligu førleikar. Hervið skal als einki ilt verða sagt um hesi fólk annars, lat tað vera púra greitt. Henda hending eigur at føra til umhugsan, og er í hesum sambandi nevnt, at vit eiga at hava eina nevnd afturat. Vit skulu hava eitt etiskt ráð. Tað er eitt gott hugskot, men hugskotið eigur ikki at verða nýtt til at fjala út yvir maktmisbrúk hjá landsstýrismanninum. Etiska ráðið eigur ikki at vera valt av einum einstøkum landsstýrismanni, men eigur at vera valt av einum breiðum skara.

Annars er málið um siðsemisnevndina avdúkandi fyri dupultmoralin í Tjóðveldisflokkinum. Tá formaðurin í Sosialinum mikudagin verður konfronteraður við óskilið, so hevur hann ongar viðmerkingar. Hann viðger ikki samgongumál alment! Hann viðger ikki innanfloksmál alment! Her er vent í holuni. Her eru nýggir tónar! Tað var tann tíð tá formaður Tjóðveldisflokksins gjørdi viðmerkingar til alt og øll uttan mun til, hvat slag av máli tað var. Men tá helt hann seg eisini hava fyrimunin av tí. Tá Signar á Brúnni skuldi fáast burtur frá politiskari ávirkan, so at tann harðmælti skiparin av Glyvrum kundi sleppa framat at gerast mentamaálráðharri, var alt endavent alment. Vit vilja hava reinføri, har Tjóðveldisflokkurin er við. Har Tjóðveldisflokkurin er við skulu bert sakligar avgerðir takast. Tjóðveldisflokkurin borgar fyri politiskum reinføri!

Nú er so nakað fráliðið, síðan formaðurin kommenteraði alt og øll. Tjóðveldisflokkuirn er farin í samgongu við ein tann svartasta afturhaldsflokk, ið nakrantíð hevur virkað í Føroyum – hevur latið einum flokki umboðandi ein evarska lítlan minniluta av fólkinum verða 17. mannin í samgonguni! Latið honum upp í hendi nakað so týdningarmikið sum familju- og trivnaðarmál. Tjóðveldisflokkurin hevur givið Miðflokkinum frítt spæl til at hóreiggja sær og til at spjaða sín boðskap! Tá so ráðharrin hjá Miðflokkinum fellur í freistingar og mannar Siðsemisnevndina við sínum politisku javnlíkum, hevur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum ongar viðmerkingar. Hví? kann verða spurt. Er tað tí hetta er so pínligt, at hann stendur seg best við at tiga? Er tað tí, at hann heldur hetta ikki vera Tjóðveldisflokkinum viðkomandi? Ella er hetta enn eitt dømi um ta opportunismu, sum hevur eyðkent Tjóðveldisflokkin, síðan viðhaldsfólkið hjá formanninum tók valdið í flokkinum? Kanska spyrja vit ov nær! Kanska gera vit formanninum órætt. Kanska veit hann bara ikki síni livandi ráð. Kanska er einki svar uttan hetta, at alt politiska virksemi Tjóðveldisflokksins síðan vánaliga val floksins fyrr í ár snýr seg um at varðveita maktina og at halda Javnaðarflokkin uttan fyri politisku maktina. Sama ger, hvør orsøkin til tøgn formansins er. Hann hevur ivaleyst skilt, at hann stendur seg best við at tiga og vit kunnu bert minna hann á, at hann, ið tegir, hann samtykkir. Í hesum føri samtykkir hann í ódámliga og ódemokratiska leiki Miðfloksins á politiska leikpallinum. Hvat restin av Tjóðveldisflokkinum og floksins baklandi sigur til hesa tøgn kundi verið áhugavert at hoyrt.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ódámlig viðferð!

Niels Pauli Danielsen

Hans Eiler Hammer
í Klakksvík, hin 17. september 2002

Undirritaðu sóknarprestar í Klakksvík loyva sær hervið at harmast ta ljótu og sera ósømiligu viðferð, sum bæði løgtingskvinna, granskingarráðsformaður og ikki minst bløðini, Dimmalætting og Sosialurin, í oddagreinum sínum geva einum av sóknarbørnum okkara.

Anne-Lena Midjord Olofson, lektari, hevur einki annað gjørt enn at sagt ja til eina áheitan um at vera skotin upp sum limur í vísindaligu siðsemisnevndini. Hon er væl lærd, hevur drúgvar royndir og dugir sera væl at arbeiða við siðsemiligum spurningum, sum nógv dømi eru um, og duga vit satt at siga ikki at koma í hug um nakran, sum skuldi verið betur skikkað enn hon til nevndararbeiðið í eini vísindaligari siðsemisnevnd.

Lagt verður eftir Onnu-Lenu fyri trúarlív hennara. Hon gongur regluliga í kirkju her hjá okkum og til altars, men verður hon í oddagrein í Dimmalætting (13.09.02) nærmast skírd »non grata«, t.e. ikki ynskturpersónur í fólkakirkjuni saman við manni sínum, og í oddagrein í Sosialinum (13.09.02) beinleiðis sødgd at vera uttan fyri fólkakirkjuna.

Vit øtast, hvussu løgtingsfólk, bløð og almenn umboð fara við henni og hinum og spyrja, hvat ið hetta er fyri nakað. Hvat er hetta fyri samfelag, vit byggja. Og hvat er tað fyri ein kirkja, tit hugsa um??? Skal tað koma so langt, at fólk, sum kannska ikki síggjast í kirkjuni annað enn til Ólavsvøkuguðstænastuna og aðrar hátíðir, fara at jagstra og blaka tey út úr fólkakirkjuni, sum hava eitt guðslív og koma har regluliga, bæði í kirkju og til altars?

Heldur átti t.d. Dimmalætting at kravt av sínum oddagreinskrivarum, at hesi vita um tað, sum tey halda seg til at skriva um, sum t.d. oddagreinskrivarin 05.09.02, ið skrivar, at bygging og varðveiting av kirkjugørðum eigur ikki at vera ein uppgáva hjá kirkjuliðnum einsamalt. Tað er rætt, at kirkjugarðarnir í Danmørk hoyra undir fólkakirkjuna, men í Føroyum hoyrir bygging og varðveiting av kirkjugørðum undir kommununa á staðnum, sum ber allar útreiðslurnar. Hetta kundi oddagreinskrivarin fingið at vita, um hann ella hon frammanundan spurdi seg fyri um tað, ætlanin var at skriva um.

Borgarstjórin og andstøðan

Jógvan Arge
Býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin

Tað er bara heilt fáum persónsmenskum beskorið at leggja grundina undir eina politiska læru.

Borgarstjórin í Havn er eftir øllum at dømi ein av hesum úrmælingum.

Hann vil vera við, at stórur munur er á at vera í minniluta og at vera í andstøðu, og hann gremur seg um, at minnilutin í Tórshavnar Býráð virkar sum andstøða.

Læran hjá Jan Christiansen tykist vera, at teir flokkar, sum verða settir uttanfyri eina meirilutasamgongu, skula ikki vera ímóti politikkinum hjá meirilutanum.

Teir skula helst slúka alt tað, sum samgongan kastar fyri teir.

Hesi læru kann eg ikki taka undir við. Rokni við, at vit eru í hvør sínum parti í býráðnum av teirri einføldu orsøk, at vit ikki eru á einum máli um høvuðsheitini í politisku kósini.

Borgarstjórin hevur sjálvur valt sínar samstarvsfelagar. Hann skipaði sjálvur fyri at seta minnilutan/andstøðuna uttanfyri samgonguna uttan orð ella boð, og vit høvdu ikki ávirkan á tann politiska setningin, sum samgongan setti sær fyri.

Men kortini hava vit okkara hugsan um, hvussu mál av samfelagsligum týdningi eiga at verða loyst, og okkara hugsan samsvarar ikki altíð við hugsanina hjá samgonguni í býráðnum.

Tað gera vit javnan vart við, og samstundis kenna vit tað sum okkara einføldu skyldu at rópa varskó, tá samgongan fer av leið.

Hetta er orsøkin til, at borgarstjórin heldur seg hava fingið nakrar óargaungar inn í býráðið, sum ikki duga at virka eftir hansara heimagjørdu politisku læru.

Hann hevur framvegis ikki skilt, at meiningin við fólkaræðinum eitt nú er, at ein heilur fólkavaldur stovnur skal ikki enda sum ein klubbi, har nógv verður dult og annað avgreitt í skýmaskotum – uttan at borgarnir vita av nøkrum.

At enda svar upp á báðar spurningar hansara í bløðunum. Vit høvdu onki ímóti at Bussleiðin varð boðin út. Vit hava onki ímóti, at tikið verður av lægstu tilboðum, men vit hava nógv ímóti, at Bussleiðin ikki verður viðkað til eitt gott flutningstilboð.

Tíðin krevur meiri kollektiva ferðslu, tí trýstið á umhvørvið, veganetið og parkeringsplássinni er ov stórt og verður bara størri.

Í býráðnum hildu vit onga grund vera til at dylja hesa hugsan – sjálvt um hon ikki hóvaði borgarstjóranum og hansara samgongu.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Siðseminevndin - ein persónlig viðmerking

Jens Wang, Løgfrøðingur, Hoyvík

Tað hevur verið sagt fleiri ferðir í fjølmiðlunum síðstu dagarnar, at undirritaði og hini trý nývaldu í siðseminevndini, ikki vóru vald vegna okkara fagliga førleika, men út frá tí at landsstýrismaðurin í heilsumálum kennir okkara (andaligu) meiningar, og at hann tískil hevur valt sítt egna fólk. Fleiri persónar hava stigið alment fram og sagt, at vit bert eru vald tí okkara sjónamið eru "víðgongd", "ikki hóvlig" o.l., og at vit vegna okkara samkomutilhoyri og/ella kristnu trúgv ikki eru egnaði at umboða Føroya fólk í siðseminevndini.

Eg kenni ongan av hinum trimum nývaldu persónliga, og er hendan grein tískil bert skrivað vegna meg sjálvan.

Fyrst vil eg siga, at tað hevur verið ótespiligt at verða vorðin politisk kastibløka í hesum málið. Tá eg varð spurdur, um eg vildi taka av einum nevndarsessi í siðseminevndini, visti eg ikki hvør annar var vorðin spurdur, og grunaði eg tí heldur ikki, at hetta málið fór at gerast slíkt stór mál. Síðani skal eg her afturvísa tveir pástandir, ið hava verið frammi:

Fyrsti pástandur: Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur valt sítt egna fólk í siðseminevndina!

Sjálvur havi eg aldrig hitt ella tosa við landsstýrismannin í heilsumálum. Ikki eina einastu ferð. Av somu orsøk veit eg heldur ikki, hvørjar hugsanir hann hevur um siðsemi og siðseminevndina. Tað er jú siðsemi og siðseminevndina málið snýr seg um - ella hvussu? Eg havi aldrig úttala meg alment um hetta evnið. Av somu orsøk kann landsstýrismaðurin ikki kenna mínar hugsanir á hesum øki. Eingin hevur heldur spurt meg um mína hugsan - heldur ikki fjølmiðlarnir, Anita á Fríðriksmørk, Eyðun Andreassen ella nakar annar. Politiskt valdi eg tjóðveldisflokkin við síðsta løgtingsval.

Eg vil halda uppá, at Bill kennir ikki mínar meiningar, annað enn tað, at eg gangi út frá, at hann veit av, at eg havi ein virknan leiklut í brødrasamkomuni. Hví verið eg so alíkavæl skýrdur at verða "víðgongdur" v.m.? Er tað mín leiklutur í brødrasamkomuni, ið er trupuleikin? Tað skal ikki verða nøkur loyna, at eg eri samdur í læruni hjá brødrasamkomuni. Høvuðsboðskapurin í hesi læru, er sum flestu føroyingum kunnugt, at ein hvør, ið trýr á Jesus skal verða frelstur (sí t.d. Jóhannesar evangelium 3:16). Júst hesin boðskapur er sambært Martin Luther grundarsteinurin undir hansara læru, og harvið eisini undir føroysku evangelisku luthersku fólkakirkjuni - ella hvussu? Um hetta er rætt, hvat er tað so, ið ger meg "víðgongdan" og harvið diskvalifiserar meg?

Vísandi til omanfyristandandi haldi eg fyri mítt viðkomandi, at tað eru ikki saklig sjónarmið, sum liggja til grund, tá sagt er vorðin valdur.

Annar pástandur: Nývaldu limirnir eru ikki faktiska vælkvalifiseraðir at sita í siðseminevndini!

Tvær útgávur hava verið frammi í fjølmiðlunum síðstu dagarnar av hesum pástandi.

Fyrra útgávan helt uppá, at tá ein persónur er so "víðgongdur", sum vit fýra nývaldu er vorðin skýrd at verða, so vil ein seta forboð fyri gransking og í besta føri bert nýta egnu serstøku bíbliutulkingar, sum grundalag fyri støðutakan í siðseminevndini. Eg kann bert úttala meg fyri meg sjálvan og siga, at eg mær kunnugt einki havi ímóti gransking. Eg havi ongar ætlanir um at setta 1 limirnar, ið landsstýrismaðurin velur, skyldast tað vanliga at lóggávuvaldið ynskir eina fakliga og menniskjaliga breidd, ið ikki skal avmarkast til fólk við ávísum útbugvingum. Tí er bakarin í prinsippinum líka væl egnaður sum arbeiðsmaðurin og fulltíðargranskarin líka væl egnaður sum bankamaðurin, at sita í slíkari nevnd. Í hesum føri fall valið so á ein lektara, eina leiðandi sjúkrasystir, ein fyristøðumann og á ein løgfrøðing. Teir 3 limirnir, ið læknafelagið velur, eru sum verða mann læknar og biomedicinske forskningsprojekter. § 3, stk. 1, pkt. 1, er soljóðandi: "Den færøske regionale komite består af mindst 7 medlemmer, hvoraf 4 udpeges af Landsstyremanden og 3 udpeges af den færøske lægeforening." Tað er ikki óvanligt, at slíkar ásetingar eru tá nevndir skulu mannast. Tá eingi faklig krøv verða sett til teir 4 limirnar, ið landsstýrismaðurin velur, kunnu á tann hátt tryggja at fakspesifikki kunnleikin er til staðar í siðseminevndini.

Vísandi til omanfyristandandi haldi eg fyri mítt viðkomandi, at tað eru ikki saklig sjónarmið, sum liggja til grund, tá sagt verður, at nývaldu limirnir eru ikki fakliga kvalifiseraðir at sita í siðseminevndini.

Lat meg enda við at siga, at eg veit væl at høvuðspurningurin í hesum málið, snýr seg um at fleiri halda, at valið hjá landsstýrismanninum í heilsumálum av nevndarlimum ikki umboðar Føroya fólk nóg breitt. Eg havi onga ávirkan havt á hetta val, og ætli mær ikki her at taka dagar ímillum, um hetta val var sakligt ella ikki. Tað stendur tó sjálvandi einum og hvørjum frít í boði, at siga sína hugsan um hetta val, og er tað gott fyri demokratii, at slíkir spurningar verða havdir á lofti.

Tað hevði tó verið ynskligt at tey fólk, ið úttala seg um slíka vísindaliga nevnd, sjálvi hildu seg til grundreglurnar fyri vísindaligum arbeiði. Her hugsi eg um t.d. objektivitet, sakligheit, at eftirkanna síni ástøði, o.s.fr. Fordómar eru vanliga ikki við í amboðskassanum hjá einum granskara/vísindamanni.

Eg ynski ikki at gerast partur av einum longri blaðkaki. Tí verða ikki fleiri orð sødgd alment frá mínari síðu í hesum málið.

Frítíðarstovan í KFUM í Havn 10 ár

FRÍTÍÐARSTOVA
Tíðindaskriv

Frítíðarstovuni í KFUM hesi 10 árini og onnur, sum hava tilknýtið til arbeiðið.

1. august vóru 10 ár síðani Frítíðarstovan í KFUM í Havn byrjaði virksemi sítt. Hetta var fyrsta frítíðarstovan í Havnini, har børn í forskúla- og skúlaaldri fingu tilboð um ansing.

Børnini, sum ganga í Frítíðarstovuni í KFUM, eru í aldrinum 6 – 8 ár.

Í Frítíðarstovuni í KFUM eru 27 børn, sum verða ansað hvønn dag frá kl.10.30-16.45, og har starvast 4 fólk.

Fríggjadagin 20. september kl. 15.00 verður skipað fyri eini hugnaløtu í Frítíðarstovuni í KFUM. Tá hittast børn, foreldur og stravsfólk og tey, sum hava arbeitt í